átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið

### So høgt elskar hann okkum

“Ella heldur tú, at eg ikki kundi biðið faðir mín, so at hann nú í stundini sendi mær meira enn tólv legiónir av einglum til hjálpar?” (Matt. 26,53)

Krossurin er eitt alheims tekin uppá kristindómin. Tú sært hann á kirkjutornum og gravsteinum. Men hvussu ber tað til, at eitt slíkt torturamboð gjørdist ein áminning um fyrigeving og vón fyri mong? Vit ganga hóast alt ikki runt við smáum guillotinum av gulli um hálsin ella heingja plakatir upp á kirkjumúrin av hernaðarligum eindum í krýggi. Svarið finst í sjálvum krossinum. Tann vatnrætti bjálkin vísir víddina av kærleika hansara – tann loddrætti bjálkin er tekin um dýpdina og hæddina á kærleikanum. Ein so víður, so djúpur og so høgur kærleiki ger, at Gud kann bæði vera rættvísur og beinasamur, uttan at lækka støðið sítt. Hann kann leggja dent á bæði sannleika og miskunn, og hann kann frelsa okkum, uttan at góðtaka syndir okkara.

Jóhannes segði: »Tí at so elskaði Guð heimin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív« (kapittul 3, ørindi 16). Tað er orsøk til at vísa takksemi fyri, at tað ongastaðni stendur, at Gud bert elskar tey ríku, tey kendu, tey vøkru, tey edrúu ella tey, sum hava viðgongd í lívinum – tí annars vóru vit øll illa stødd! Nei, um bert vit liva í »heiminum«, eru vit tald við í tey, sum hann elskar!

Jesus var ikki noyddur at doyggja. Hann valdi at gera tað! Max Lucado sigur tað soleiðis: »Megin í træhamaranum var ikki rópini frá teirru illu fólkamongdini; hondin, sum tók um skaftið, var ikki hon hjá tí rómverska hermanninum; dómurin varð ikki sagdur av øvundsjúkum jødum. Jesus valdir sjálvur naglarnar út. Um hermaðurin hevði drálað, vildi Jesus sjálvur neglt teir í!«

So høgt elskaði hann okkum!

*(Kelda: ubc.dk)*

# Fríska uppaftur líðingina á krossinum



*Joseph Mawle hevur leiklutin sum Jesus í nýggju røðini, sum BBC 1 fer at vísa á páskum (Mynd: www.bbc.co.uk)*

**Væntandi fara 10 mió. bretar at fylgja við í nýggjari sjónvarpsrøð um krossfesting Jesusar, sum verður send í prime time í BBC1 á páskum.**

**Bretland:** Deyði Jesusar og uppreisn fær bestu senditíð, tá bretska sjónvarpsrásin BBC fer at senda hesa røðina, sum er í fýra pørtum um høvuðspersónin í kristindóminum.

Røðin, sum er ein av fleiri komandi sendingum um kristnu trúnna, fer sambært miðlaserfrøðingum væntandi at verða sædd av 10 mió síggjarum, skrivar kristna tíðindastovan www.ekklesia.co.uk.

Hon verður send í kjalarvørrinum av, at kristnir bólkar í longri tíð hava gramt seg um, at alt ov lítið er at síggja til kristindómin í bretskum sjónvarpssendingum, meðan aðrir átrúnaðir fáa alt meiri og meiri senditíð.

Formaðurin fyri Miðlaráð Kirkjunnar, pastor Joel Edwards væntar, at nýggja røðin sum byrjar nú sunnudagin – pálmasunnudag – fer at fáa »ein sera stóran týdning fyri alla tjóðina«, sum hann tekur til.

*Møguleiki hjá kirkjuni*

Pastor Edwards hevur í einum brævi til hundraðtals kristnar leiðarar í Onglandi heitt á teir, um at fyrireika seg uppá sendingina »The Passion« (Líðingin), sum hon eitur.

- Av og á koma týdningarmiklir møguleikar hjá kristnu trúnni at gerast virkin í mentunarlívinum. Ein av hesum møguleikunum er henda komandi sendingin, skrivar hann til prestarnar.

Ein tvørkirkjuligur bólkur, sum Miðlaráð Kirkjunnar hevur sett niður, hevur haraftrat gjørt eina heimasíðu um røðina.

- Hetta er ein ótrúligur møguleiki at elva til eitt nútíðar alment tjak um Jesus, sigur bólkurin í eini áheitan á kristnu samkomurnar í Onglandi.

Formaðurin í Miðlaráðnum, Andrew Graystone fekk herfyri møguleika at síggja partar av røðini. Og hann er bergtikin av henni.

- Hetta er eitt serstakliga livandi drama, og ein følir, at ein er til staðar millum lærusveinarnar, meðan Jesus greiðir frá teimum einføldu, men kortini ógvusligu sannleikunum, sigur hann, og leggur aftrat:

- Hesar páskirnar fer alt landið at tosa um Jesus. Ikki um kirkjupolitikk ella góð teologisk point, men um Jesus!

## The Passion á BBC 1

Føroyingar, ið kunna móttaka signal frá BBC1 fáa møguleika at síggja teir fýra partarnar í røðini The Passion.

Fyrsti partur verður sendur um kvøldið pálmasunnudag, annar partur mánakvøldið og teir báðir seinastu partarnir langafríggjakvøld og páskakvøld.

Fleiri upplýsingar um røðina finnast á heimasíðuni http://www.bbc.co.uk/religion/programmes/thepassion/

# Páskastevna við filipinskum talara

**Hann hevur vitjað í Oasuni tríggjar ferðir áður, og kemur nú aftur á fjórða sinni - Jerome Ocampo frá Filipsoyggjunum**

**Hoyvík:** Hósdagin í komandi viku – skírisdag – byrjar páskastevnan í Oasuni við møti, har hesin pastorurin fer at tala á fyrsta sinni.

Hetta er samstundis byrjanin til eina møtirøð, sum ikki endar fyrrenn 2. páskakvøld. Saman við sær hevur Jerome konuna, Annabella og fer hon eisini at hava orðið á páskastevnuni í Oasuni.

Jerome Ocampo er ein leiðandi kristniboðari og hevur vitjað í Oasuni í 1992, 1993 og aftur í 2006. Hann er pastor fyri ”Jesus Flock” kirkjuna í høvuðsstaðnum Manila, - eini kirkju, ið hann sjálvur hevur stovnað.

- Vit gleða okkum ómetaliga nógv til hesa stevnuna, og ynskja at Harrin skal vitja okkara fólk á ein undurfullan hátt, so at vekingin kemur, verður sagt úr samkomuni.

Samstundis við filipinsku vitjanina, fáa tey ungu í samkomuni vitjan úr Kristkirken í Bergen. Saman við fyristøðumanninum, Håvard Berger fara ung úr báðum samkomunum at skipa fyri fleiri tiltøkum, bæði í Oasuni og uttandura í Havn.

## Páskastevnur kring oyggjarnar

**Føroyar:** Nú stóra kristna hátíðin stendur fyri framman, skipa fleiri samkomur fyri páskastevnum í heimbygdini. Millum tær mongu stevnurnar kunnu nevnast samfelagsstevnan í Porkeri, Fuglafirði og í Kambsdali, eins og Heimamissiónin skipar fyri páskastevnum í Havn, Hvalba og í Dali, og sum siður er eisini í Leirvík.

## Kristnar bøkur selja sera væl



**Danmark:** - Eg trúgvi neyvan at tað hava verið seldar fleiri kristnar bøkur enn júst nú, sigur marknaðarleiðarin í bókasøluni hjá danska Bíbliufelagnum. Ein av bestseljarunum í løtuni er ævisøgan hjá kendu gospelkvinnuni Etta Cameron (myndin), sum er seld í fleiri enn 20.000 eintøkum. – Vit kunnu staðfesta ein vaksandi áhuga fyri bókum um trúgv, átrúnað og tilveru, sigur kreativi stjórin Jakob Kvist í forlagnum People’s Press. Fleiri onnur forløg kunnu siga frá tí sama. Marknaðarleiðarin Søren Moesgaard í Bíbliufelagnum sigur, at tey hava selt omanfyri 10.000 eintøk av nýggju týðingini av Nýggja Testamenti.

## Kurdar gerast kristnir

**Irak:** Hóast ófrið og áhaldandi forfylging av teimum kristnu, koma fólk í hópatali til trúgv. Mission Network News veit at siga, at tær vanligu kristnu samkomurnar í Irak fækkaðu niður í eina helvt eftir Golf-kríggið í 90’unum, men nú tykist vend at vera komin í. Í túsundatali av muslimum gerast nú kristnir kring alt landið. Carl Moeller, leiðari í kristna felagsskapinum Open Doors í USA sigur, at haldgóð prógv eru fyri at irakar í stórum tali venda sær til Jesus. – Í Kurdistan, har norðuri í landinum, finst enntá ein samkoma við ”muslimskari bakgrund”. Fyri einum ættarliði síðani hevði verið púrasta óhoyrt at tosa um eina kurdiska samkomu. Í dag finnast í túsundatali av kristnum kurdum við muslimskari bakgrund, sigur Carl Moeller.